Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Súsanna Bertholdsen, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýrismaður í almanna- og mentamálaráðum

Evni: Heim í Suðuroynni fyri borgarar við avbjóðingum

Spurningar:

1. Hvør er grundgevingin fyri, at uppruna ætlanin um heimið í Suðuroynni fyri borgarar við avbjóðingum er broytt?
2. Hvussu nógvar borgarar hevur Almannaverkið á bíðilista til bútilboð í Suðuroynni?
3. Fer heimið, sum er í umbúna, at nøkta akutta tørvin, og verða møguleikar fyri at víðka um tilboðið?

11. mai í ár setti undirritaða ein skrivligan § 52a fyrispurning (52-100/2022) um heim í Suðuroynni fyri borgarar við avbjóðingum.

Í svarinum frá landsstýrismanninum í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, 24. mai í ár stendur, at ætlanin er at bjóða borgarum, sum eru á bíðilista til búpláss í Suðuroynni, pláss á nýggja heiminum, og at hugsanin er, at bústovnurin fer at hava 5 búpláss og 2 umlættingarpláss.

Hetta er ikki í samsvari við uppruna ætlanina um ein stovn, sum skuldi hýsa 10 borgarum við seinheilaskaða, menningartarni og við autismu, umframt at møguleiki skuldi verða fyri umlætting.

Avvarðandi hjá borgarum, sum í langa tíð hava bíðað eftir hesum tilboði, eru ørkymlaði yvir, at talið av búplássum er skert, og tí seti eg hesar spurningar.

Á Løgtingi, 14. juni 2023

Súsanna Bertholdsen